## Sølustevna og undirhald á Tvøroyri

Hetta vikuskiftið verður sølustevna í ítróttarhøllini í Trongisvági við nógvum framsýnarum og ymsum undirhaldi. Tað er Tvøroyrar Svimjifelag og Tvøroyrar Bótlfelag, ið skipa fyri sølustevnuni, sum verður fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin.
Feløgini siga, at tey hava lagt dent á at hava eina fjølbroytta skrá, har eisini ymiskt undirhald er á skránni. Tí syrgja Føroya stuttligasti og næst stuttligasti maður fyri. Men harafturat fara Sámal Ravnsfjall og Jóan Jakku Guttesen at syngja og spæla og tað fara Poul Arni Holm og Jón Joensen eisini.
Kirkjukórið Ljómur úr Vági setir sín dáam á stevnuna og tað gera dansigentur somuleiðis.
Tað verður Jaspur Vang, býráðslimur á Tvøroyri, sum setur stevnuna fríggjadagin klokkan 14 og Elinborg Nolsøe, endar hana sunnukvøldið klokkan 20.30. Fíggjakvøldið er opið til klokkan 22 og leygarkvøldið er opið til klokkan 23.
Framsýnararnir eru ímillum 20 og 25 í tali við øllum møguligum vørum og tænastum.

## Sunnleif á Sandi

Í morgin, dýrabiðidag, verður eitt forvitnisligt tiltak heima á Sandi. Tá fer tónaskaldið Sunnleif Rasmussen, sum sjálvur er heimasandsmaður, at spæla brot úr sínum egna tónleiki við støði í føroysku náttúruni so sum ljóði av fugli og sjógvi. Harafturat fer hann at lesa yrkingar, sum hava givið honum íblástur til tónleikin, og hann fer eisini at spæla tónleik út frá hesum. Tað er Listasavnið á Sandi, sum skipar fyri tiltakinum í morgin kl. 16.

# Jacob Vestergaard fullan rætt at flyta Strandferðsluna

**Løgtingsins Umboðsmaður vil ikki finnast at framferðini hjá Jacob Vestergaard í sambandi við avgerðina um flyta Strandferðsluna til Suðuroyar**

ALMENN STARVSFÓLK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Løgtingsins Umboðsmaður staðfestir, at politiski myndgleikin hevur fullan rætt at gera av, hvar Strandferðslan skal vera og í hesum føri kom fráboðanin um flytingina í góðari tíð*

Tað er ongin orsøk til at finnast at framferðini hjá Jacob Vestergaard, landsstýrismanni í innlendismálum, fyri avgerðina um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar.

Tað staðfestir Løgtingsins Umboðsmaður.

Hann sigur, at hann hevur ikki grundarlag fyri at halda, at avgerðin um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar, byggir á annað enn saklig og lóglig atlit.

Tað var Starvsmannafelagið, sum legði málið fyri Løgtingsins umboðsmann vegna ein av limunum, sum arbeiðir á Strandferðsluni.

Kært varð serliga um, at starvsfólkið ikki varð hoyrt, áðrenn avgerðin varð tikin.

### Kæran afturvíst

Men nú hevur Løgtingsins Umboðsmaður víst kæruni frá sær.

Hann metir eisini, at avgerðin um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar er so umfatandi, at tað má metast sum at starvsfólkini er søgd upp og hava fingið tilboð um nýtt starv.

Men Innlendismálaráðið hevur greitt Løgtingsins Umboðsmanni frá, at avgerðin um at flyta stovnin, byggir á eina politiska semju.

Og Umboðsmaðurin skilir støðina soleiðis, at avgerðin um at flyta Strandferðsluna, var tikin, sama hvørji sjónarmið, starvsfólkið hevði.

Og tað er ikki neyðugt at ráðføra seg við starvsfólkið, tá ið avgerð kann takast á tí grundarlagi, sum er.

Í slíkum føri er talan um eina yvirskipaða avgerð, tí tað snýr seg um at flyta øll størvini á skrivstovuni hjá Strandferðsluni til Suðuroyar.

Umboðsmaðurin vísir eisini á, at Innlendismálaráðið hevur heimild til at gera av, hvar Strandferðslan skal vera.

Og hann heldur eisini, at avgerðin er tikin í so góðari tíð, at starvsfólkini hava møguleika at umhugsa støðuna og at taka støðu til, um tey vilja flyta við, ella um tey finna sær annað starv.

Tí hevur Umboðsmaðurin ikki grundarlag fyri at finnast at Innlendismálaráðnum fyri, at tað ikki hevur hoyrt starvsfólkini frammanundan.

Men heilt snikkaleyst sleppur Innlendismálaráðið kortini ikki, tí Løgtingsins Umboðsmaður mælir Ráðnum til, at málið verður fylgt upp skjótast gjørligt, so at starvsfólkini skrivliga fáa at vita, hvat flytingin merkir fyri tey ítøkiliga, so at tey vita, hvat tey hava at halda seg til.

Hetta hevði verið góður fyrisitingarligur siður, heldur Løgtings Umboðsmaður.

# Gunnleivur ósamdur við Løgtingsins Umboðsmann

**Formaðurin í Starvsmannafelagnum er ikki samdur við Løgtingsins Umboðsmann um framferðina hjá Innlendismálaráðnum í sambandi við avgerðina um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar**

ALMENN STARVSFÓLK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg taki avgerðina hjá Løgtingsins Umboðsmanni til eftirtektar. Men eg eri ikki samdur.

Tað kom eitt sindur óvart á formannin í Starvsmannafelagnum at Løgtingsins Umboðsmaður góðtekur framferðina hjá Jacob Vestergaard í sambandi við avgerðina um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar.

Sum tað sæst aðrastaðni í blaðnum, heldur Løgtingsins Umboðsmaður ikki at grundarlag er fyri at finnast at avgerðini um at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar, hóast starvsfólkini ikki vórðu hoyrd frammanundan.

Hann sigur, at hann fer ikki at siga, at niðurstøðan hjá Umboðsmanninum er skeiv og tí kann hann ikki annað enn at viðurkenna hana og taka hana til eftirtektar.

Men hinvegis staðfestir hann samstundis, at hann er ikki samdur í niðurstøðuni.

- Umboðsmaðurin tosar um saklig atlit. Men kann ikki siga at vit kenna hesi sakligu atlit fyri flytingini, sum Umboðsmaðurin kennir.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum sigur, at orsøkin til, at Starvsmannafelagið vildi hava eina hoyring, var júst fyri at fáa greiði á, hvørji tey sakligu atlitini vóru fyri flytingini, tí tey hevur felagið ikki sæð.

Gunnleivur Dalsgarð vísir á, at Umboðsmaðurin metir, at flytingin er at meta sum um at starvsfólkið á Strandferðsluni, er sagt upp, men at ein politisk semja telir meiri.

- Tað eri eg ikki samdur í, tí eg haldi ikki, at framferðin ímóti starvsfólkunum er saklig og virðilig.

- Einasta sakliga atlit, vit hava fingið at vita, er, at hetta er eitt tiltak fyri at menna útjaðaran.

- Men tað er ikki eitt sakligt atlit mótvegis starvsfólkunum og tað sakna vit í hesum málið.

### Kanna málið

Gunnleivur Dalsgarð staðfestir, at ein niðurstøða hjá Løgtingsins Umboðsmanni, er ikki bindandi og nú fer Starvsmannafelagið at kanna, hvat meiri kann gerast við málið.

- Tað vildi verið ógvuliga natúrligt, at vit venda okkum til Innlendismálaráðið fyri at fylgja málinum upp.

Hann vísir á, at Løgtingsins Umboðsmaður eisini heitir á Innlendismálaráðið um at fylgja málinum upp í samsvari við góðan fyrisitingarsið, so at starvsfólkið fáa skrivliga at vita, hvat flytingin merkir og so at tey vita, hvat tey hava at halda seg til.

Við hesum staðfestir Umboðsmaðurin, at Innlendismálaráðið kortini ikki hevur borið seg rætt at.

Kann tað hugsast at tit fara at taka hetta upp í eini komandi sáttmálasamráðing, so at tit fáa onkrar serligar ásetingar um hetta, næstu ferð, tit gera sáttmála

- Eg vildi vent spurningin við og sagt, at hóast talan er um eina politiska avgerð, vildi tað verið skilagott, at Innlendismálaráðið boðaði starvsfólkinum frá frammanundan, so at eitt samskifti kundi vera við starvsfólkið um, hvussu vit loysa málið á virðiligan hátt.

- Sama um talan er um eina politiska avgerð, eigur starvsfólkið altíð at fáa eina virðiliga viðferð, tí tað hava tey krav upp á og tað hava tey ikki fingið í hesum máli.

- Vit kunnu ikki seta okkum upp ímóti eini politiskari avgerð, men vit hava krav upp á at Starvsfólkið fær eina virðiliga viðgerð, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

- Tí eiga allir partar at taka annað skinn um bak so at virðiligar loysnir kunnu finnast á málum, sum hesum.

Tí fer Starvsmannafelagið nú at kanna eftir, hvat kann gerast fyri at slíkt ikki hendir aftur.

Men, hvat talan kann vera um, veit hann ikki enn.